## Vildi ikki siga navnið

Á býráðsfundi mikudagin setti Tvøroyrar Byráð ein leiðara, ella fyribilsleiðara, fyri umstrídda frítíðarskúlan. Kristin Michelsen, borgarstjóri, hevur onga viðmerking til, hvør tað er, sum er settur.

- Tað er ein av umsøkjarunum. Annars havi eg onga viðmerking. Nú má friður valda yvir hasum starvið, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri

Sosialurin frættir frá aðrari keldur, at tann, sum fekk leiðarastarvið á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri, eitur Siri Mortensen. Hon er júst útlærd sum pedagog. Tveir umsøkjarar vóru til starvið.

**-hkm**

## Landssjúkrahúsið norðurlendskan standard



*Sjúkrahússtjórin væntar ikki uppsagnir í sambandi við broytingar í vaskingini, men hann sigur, at møguliga verður minni brúk fyri tímaløntum starvsfólki*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Vit fara í gongd við at endurskoða, hvussu vaskingin verður gjørd á Landssjúkrahúsinum. Vit skulu hava ein norðurlendskan standard, sigur Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri.

Landssjúkrahúsið hevur keypt eitt programm, har alt sjúkrahúsið verður gjøgnumgingið. Leiðslan hevur verið í samband við ráðgevingarfyritøku, sum skal definera areal og tørv á vasking. Endurskoðanin skal gerast teir komandi mánaðirnar.

- Vit rokna við at fáa eina meira effektiva vasking. Vit hava sett eina broytingarprocess í gongd, og vit tosa eisini við Arbeiðskvinnufelagið og starvsfólk um hetta, sigur Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri.

**-hkm**

Løgmaður:

# Avgerðin verður altíð politisk

**Sjúður Skaale skrivaði í Sosialinum leygardagin, at tað ber altíð til hjá politikarum at bíleggja sær politisk argument frá einum advokati, og at hesir hava fingið einarætt upp á sannleikan í føroyskum politikki. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur hinvegin, at í síðsta enda verður tað altíð ein politisk avgerð, sum verður tikin**

BÍLAGT ARBEIÐIÐ
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Myndatekstur: Stjórnmálafrøðingurin Sjúrður Skaale finst at, at politikarar í ov stóran mun bíleggja notatir frá advokatum við løgfrøðiligum argumentum til brúk í politiska retorikkinum, og at hesir advokatar nærum hava patent upp á sannleikan. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heldur, at tað er onki forgjørt í at biðja um metingar frá serfrøðingum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Tað má liggja á einum hvørjum politikara í síðsta enda at taka eina rationella avgerð í einum máli. Men eg dugi ikki at síggja nakað skeivt í, at ein løgtingsnevnd til dømis biður um metingar frá serfrøðingum undir málsviðgerðini. Tað er til dømis púra vanligt, at nevndarlimir í Løgtinginum fáa úttalilsir frá serfrøðingum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

- Tað er jú bara í tilgongdini, at mann vil hava málið lýst. Í síðsta enda verður tað jú ein politisk avgerð, sum verður tikin. Alt skal sjálvandi vera við máta. Um bureaukratar fáa ov stórt vald, so er tað bara tekin um, at mann hevur ov veikar politikarar. Tað dugi eg ikki at síggja, at vit hava í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 21, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin styrknaður enn meir

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku helt dollarin áfram at styrkjast. Kursurin kom niður um 1,26 í mun til evruna fyri fyrstu ferð síðan oktobur mánaða, og er í løtuni um 1,255. Tað er áhugavert, at dollarin styrknaði, hóast lyklatølini ikki stuðlaðu undir honum. Hetta bendir á, at marknaðurin er vorðin meiri bjartskygdur um dollaran, og at hann kann styrkna enn meira komandi tíðina. Kreppan um Evropagrundlógina fær eisini evruna at vikna.

Brentoljan er lækkað 15% síðan mars mánað, og er nú um 48 dollarar fyri tunnuna. Formaðurin fyri OPEC segði í vikuskiftinum, at hann ikki sá nakra orsøk til at lækka framleiðsluna, og samstundis er eitt 5-daga verkfall hjá oljuframleiðarum í Fraklandi júst av.

### Lánsbrævarenturnar aftur sett met

10-ára danska rentan var heilt niðri á 3,34% í farnu viku. Hon hevur sveiggjað eitt sindur niðan fyri 3,40% seinastu tíðina, og áhugavert er, um hon fer at seta met aftur. Líkindi eru fyri, at bjartskygnið hjá lánsbrævaíleggjarum sum frá líður fær yvirvágina, so rentan kann halda áfram niðureftir.

### Partabrøv standa seg væl

Farna vika var ein góð partabrævavika. Amerikonsku marknaðirnir hækkaðu at kalla alla vikuna orsakað av góðum roknskapum og lyklatølum. Lækkaði oljuprísurin var eisini jaligur fyri marknaðirnar. Um okkara leiðir stóð Vestas seg væl, og er hækkað um 15%, tí felagið hevur gjørt frambrot í India og Vietnam samstundis sum kappingarneytarnir eru jaligir um komandi tíðina.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna kemur ein rúgva av áhugaverdum lyklatølum. Úr USA koma tøl fyri BTÚ-vøksturin, prísvøkstur og privatu nýtsluna. Í Evropa er tað serliga Týskland, sum er í andgletti. Haðani koma fleiri álitistøl og tøl fyri prísvøksturin. Álitistølini hava seinastu mánaðirnar verið heldur døpur. Vikan kann tí gerast óstøðug fyri bæði láns- og partabrøv, hóast partabrøv sýnast at vera í einum góðum stima í løtuni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,93 | 0,7% |
| JPY | 5,48 | -0,2% |
| GBP | 10,84 | -0,6% |
| NOK | 0,92 | -0,2% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,55 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 174,74 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 90,00 | 1,0% |
| Altjóða Vøkstur | 62,37 | 2,9% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*